## Skip við fallskíggja

Heimsins fyrsta farmaskip við einum ovurstórum fallskíggja sum segli er nú á veg tværtur um Atlantshavið úr Týsklandi til Venesuela. Fyritøkan Skysails hevur gjørt fallskíggjan, sum er festur har frammi á skipinum, og sum er teldustýrdur. Skíggin er 160 fermetrar stórur, og kanningar hava víst, at »Beluga«, sum skipið eitur, brúkar 20 prosent minni olju við at brúka skíggjan sum segl. Talan er um nýggja tøkni, sum hevur vakt áhuga.

*(Mynd: Reuters)*



## Kvotuskerjing svíður

Í Íslandi noyðist enn eitt fiskavirki at taka avleiðingarnar av avgerðini hjá stjórnini at skerja toskakvotuna. Í gjár kunngjørdi leiðslan í felagnum Vísi, at hon hevur gjørt av at lata virkini í bygdunum Húsavík og á Þingeyri aftur í tíðarskeiðinum frá 1. mai til 1. oktobur. Virkini hjá felagnum mistu 2.700 tons av toski um árið, tá kvotan bleiv skerd. Virkið hjá Vísi í Húsavík hagreiðir hýsu burturav, meðan virkið á Þingeyri arbeiðir hýsu og tosk.

Sandoy Seafood:

# Hóast eingin framleiðsla er á Sandi vanta fólk í Skopun



**- Tann stóri trupulleikin er at fáa nóg mikið av reinskerarum. Vit skulu helst hava einar 20-24 reinskerarar, men onkran dag hava vit bert 16. Menn tíma ikki at reinskera, sigur Martin Olsen, virkisleiðari á Sandoy Seafood í Skopun**

**FISKAVIRKING**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin í síðstu viku fóru tey umleið 70 fólkini aftur til arbeiðis á Sandoy Seafood í Skopun. Tá keypti virkið fyrstu lastina í nýggja árinum, og síðan hendan dag hava gólvini ikki verið turr.

- Vit hava arbeitt hvønn dag, og vit hava eisini fiska til alla hesa vikuna.

Tað sigur Martin Olsen, virkisleiðari á Sandoy Seafood í Skopun.

Í dag klokkan 13 byrjaðu teir at landa ísfiskatrolaran Eysturbúgvin á Sandi. Teir hava 150.000 pund, meginparturin upsi.

- Hóast einki framleiðsluvirksemi er á virkinum á Sandi, verður fiskurin kortini landaður har. Fiskurin verður koyrdur inn á virkið á Sandi, har hann verður goymdur í kuldarúminum. So hvørt, sum vit arbeiða undan í Skopun, verður fiskurin koyrdur norður til virkingar.

Martin sigur, at síðan saltfiskaarbeiði á Sandi helt uppat í apríl/ mai mánaða í fjør, hevur Sandoy Seafood havt landingarvirksemið eftir.

- Vit standa sjálvir fyri landingini, sum soleiðis gevur monnum nakrar tímar, tá ið skip eru inni.

Eysturbúgvin landar rættiliga regluliga í Sandoynni, men virkið keypir eisini fisk aðrastaðni úr landinum, eitt nú úr Suðuroy, haðani fiskurin er komin, sum tey hava arbeitt fyrstu dagarnar í hesi vikuni.

Á Sandoy Seafood í Skopun arbeiða tey bara upsa, sum verður virkaður til portiónir. Felagið plagar eisini at keypa hvíting, tá ið tann tíðin er.

- Vit keypa soleiðis ikki útróðrarfisk, og tí fer hesin av oynni til virkingar aðrastaðni.

Martin sigur, at tá ið virksemið í Skopun burtur av byggir á vørur úr upsa, loysir tað seg ikki at arbeiða útróðrarfisk, tí nøgdirnar eru sum oftast smáar.

- Tað loysti seg ikki hjá okkum at salta upsa á Sandi. Vit flaktu og turrsaltaðu upsa til kanadiska marknaðin, men tá ið dollarin er fallin so nógv, er hetta ikki lønandi, soleiðis sum støðan er.

Spurdur, um fiskavirkið í Skopun ikki hevur havt fleiri fólk at taka av, nú framleiðsluvirksemið á Sandi hevur ligið stilt, sigur Martin.

- Nei, tað kunnu vit ikki siga. Okkum vantar sum so ikki mannfólk á virkinum í Skopun, men tað eru serliga reinskerarar, sum tørvur er á. Á Sandi høvdu vit flekjarar - og ikki reinskerarar - og tí er tørvurin hin sami, sum hann var, áðrenn fiskaframleiðslan á Sandi helt uppat.

Martin vísir á, at nú er longu so langt umliðið, síðan virksemið á Sandi helt uppat, at flestu munnu hava funnið sær annað arbeiði.

- Vit høvdu soleiðis ikki



# Ikki altíð so tespiligt at sigla

Kombineraða nótaskipið og trolarin Fagraberg, sum er fyrrverandi Krúnborg, hevur nú fingið eina heimasíðu www.fagraberg.dk

Á heimasíðuni er hópur av góðum og áhugaverdum myndum, sum eru tiknar umborð á skipinum. Talan er bæði um myndir, sum eru tiknar undir fiskiskapi og myndir, sum eru tiknar innanborða av monnum, sum sigla við skipinum.

Myndir eru eisini tiknar í illveðri, har sjógvur skolar inn yvir skipssíðuna.

Ikki er altíð so tespiligt at vera sjómaður.



*Myndir av heimasíðuni hjá www.fagraberg.dk*